# ARB-Vegleiðing

# V-C002-4

**Frálæra til gaffiltrukkførarar**

# 2008/01

# Arbeiðseftirlitið

## Hvat er ein ARB-Vegleiðing?

ARB-vegleiðingar vegleiða um hvussu reglurnar í arbeiðsumhvørvislógini skulu skiljast/tulkast. ARB-vegleiðingar verða brúktar til at:

- greina út orð og setningar í reglunum (lóg og kunngerðir),
- greiða frá hvussu krøvini í reglunum kunna lúkast í royndum,
- greiða frá vitan um tulkingar av reglunum í samband við dómar,
- greiða frá hvussu arbeiðsumhvørvislógin er samansett og hvørji øki hon umfatar.

## Er ein ARB-vegleiðing bindandi?

ARB-vegleiðingar eru ikki bindandi fyri virkir, trygdarskipan e.o., men vegleiðingarnar eru skrivaðar út frá reglum (lóg og kunngerðum), sum eru bindandi.

Arbeiðseftirlitið setir ikki onnur krøv, um t.d. eitt virki hevur gjørt sum tilskila í eini vegleiðing.

Virkini kunna loysa uppgávurnar á annan hátt, men Arbeiðseftirlitið vil tá meta um, um hesin háttur er líka so tryggur og í trá við reglurnar.

**Arbeiðseftirlitið**
**Boks 1400**
**FO-110 Tórshavn**
**Tlf.: + 298 357811**
**Fax.: + 298 357810**
**T-post.: arb@arb.fo**
**Heimasíða: www.arb.fo**

### *1. Endamál.*

**§ 1.** Endamálið við skeiðinum er at geva fólki høvi at fáa eitt loyvisbræv at koyra gaffiltrukk, fyri soleiðis at røkja starv sum førari av gaffiltrukki og sjálvkoyrandi gaffilstáplara við stýristong.

Stk. 2. Skeiðið er lagt soleiðis tilrættis, at luttakararnir fáa ein hollan kunnleika til hvussu ein gaffiltrukkur virkar, viðlíkahald, trygdarútgerð, trygdarliga forsvarliga koyring undir ymiskum arbeiðsviðurskiftum, samband millum støðufesti og last og eisini vanligar reglur um góðsviðgerð og handfaring, soleiðis at luttakarnir eru førir fyri at standa royndina, ið Arbeiðseftirlitið hevur ásett fyri gaffiltrukkførarar.

### *2. Heimildir.*

**§ 2.** Í kunngerð nr. 59 frá 18. juli 1985, um loyvisbræv at koyra gaffiltrukk, §1, er ásett, at:

- *Gaffiltrukkar og gaffilstáplarar, ið hava mekaniska byrðalyfting øðrumegin við loddrøttum stólpa og hava mekaniska koyring, kunna einans teir persónar koyra, ið hava loyvisbræv at koyra gaffiltrukk og gaffilstáplara*

Stk. 2. Í kunngerð nr. 9 frá 13. februar 2002, um útinnan av arbeiði, §28, stk. 2, 4. petti, er ásett:

- *At arbeiði, ið kann hava við sær týðandi vanda ella sjúku við sær, bert verður útint av persónum, sum hava fingið eina nærri ásetta útbúgving og staðið roynd ella hava ein ávísan aldur.*

### *3. Krøv fyri at luttaka*

**§ 3.** Persónar sum hava fylt 18 ár og hava eina gilduga læknaváttan, sambært kunngerð nr. 59 frá 18/7 1985 um loyvisbræv at koyra gaffiltrukk, kunna luttaka.

### *4. Skeiðinnihald*

**§ 4.** Skeiðið umfatar:

**1)** Skeiðlýsing,
**2)** Hvussu trukkurin er bygdur upp,
**3)** Støðufesti og last av trukkinum,
**4)** Trygdarkrøv til trukkin,
**5)** Viðlíkahald av trukkinum,
**6)** Koyri- og stáplikunnleika,
**7)** Góðsviðgerð og handfaring,
**8)** Praktiskar venjingar og próvroynd.

### *5. Loyvisbræv*

**§ 5.** Fyri at koyra gaffiltrukk í Føroyum krevst, at viðkomandi hevur loyvisbræv hertil frá Arbeiðseftirlitinum. Harumframt krevur ferðslulógin, at um koyrt verður á almennum økjum, t.v.s. har onnur ferðsla kann koma til og har fólk starvast, so krevst at viðkomandi eisini hevur koyrikort til persónbil.

Stk. 2. Skeiðtilfarið, ið brúkt verður, er tað til eina hvørja tíð góðkenda tilfarið til hesa frálæru, ið "Brancheudvalgene for landtransport" í Danmark gevur út. Á henda hátt vil Arbeiðseftirlitið tryggjað sær, at føroyska prógvið altíð verður javnstillað við líknandi prógv í øllum norðanlondum.

### *6. Loyvishavarin (Góðkendur skúli).*

**§ 6.** Tann ið byrjar undirvísing, skal fyrst verða góðkendur av Arbeiðseftirlitinum.
Stk. 2. Góðkenningin kann takast aftur av Arbeiðseftirlitinum, um viðurskiftini stríða ímóti lóg og reglum.
Stk. 3. Arbeiðseftirlitið hevur í loyvisskeiðnum, eftirlit við frálæruni, fyri at tryggja, at reglurnar verða fylgdar.

**§ 7.** Arbeiðseftirlitið vil tryggja sær at loyvishavarin, ella tann í settur verður í starv sum frálærari hjá honum, hevur neyðugan førleika og vitan um frálæruna.
Stk. 2. Frálærarin skal kunna skjalprógva, at hann hevur luttikið og staði próvroynd til loyvisbræv fyri gaffiltrukk á einum av donsku AMU skúlunum og eftirfylgjandi hava ognað sær heiti “Arbejdstilsynets censor” (Censorgodkendelse / Gaffeltruck)
Stk. 3. Frálærarin skal sýna pedagogisk evni undir frálæruni.
Stk 4. Loyvishavarin skal ráða yvir neyðugum útbúnaði til bæði ástøðiliga og verkliga frálæru.
Stk. 5 Loyvishavarin skal fráboðað Arbeiðseftirlitinum trukkskeið, í seinasta lagið dagin skeiði byrjar soleiðis, at Arbeiðseftirlitið hevur møguleika at gera eftirlit sambært §6, stk. 3. Fráboðanin kann sendast sum e-mail til arb@arb.fo og viðkomandi eftirlitsfólk, ið umsitur trukk viðurskiftir.

### *7. Ástøðiliga undirvísingin*

**§ 8.** Hølini skulu verða ljós, rúmlig og skulu lúka ásetingarnar um undirvísingarhøli, eitt nú rýmingarvegir, hita og inniluft viðurskifti.
Stk. 2. Mesta loyvda tal av næmingum er 15.

**§ 9**. Ástøðiliga frálæran skal í minsta lagi verða 15 tímar á 45 minuttir.

**§ 10.** Í einstøkum førum kann næmingatalið fara upp um 15, treyta av at samlaða tímatalið veksur við 3 tímum á 45 minuttir (1 ástøðiligan og 2 verkligar) fyri hvønn næming, ið er omanfyri 15.

**§ 11**. Tímaætlan og frálærutilfar skal góðkennast av Arbeiðseftirlitinum.

### *10. Verkliga undirvísingin*

**§ 12.** Trukkurin skal í minsta lagi verða 2,5 tons til støddar.
Stk. 2 Trukkurin skal hava galdandi váttan um 12-mánaðar kanning í eftirlitsbókini fyri trukkin og annars fylgja ásetingunum í kunngerðini um lyftiútgerð og spøl.
Stk. 3. Kravd persónlig verndarútgerð s.s. trygdarskógvar skulu nýtast.

**§ 13**. Verkliga frálæran skal í minsta lagi verða 2 tímar á 45 minuttir til hvønn einstakan næming. Eftir frálæruna skal næmingurin hava neyðuga venjing til trukkin, soleiðis at næmingurin kann prógva førleika sín til próvtøkuna.
Persónar, sum eru vandir trukkførarar, t.d. tí teir hava arbeitt sum trukkførarar í øðrum landi, umborð á skipi e.a., hava ikki fyri neyðini at fáa frálæru í kravdu 2 tímar á 45 min.
Stk. 2. Tímaætlan, frálærutilfar og verkligar uppgávur skulu góðkennast av Arbeiðseftirlitinum.

### *11. Próvroynd*

**§ 14.** Uppgávur til bæði ástøðiliga og verkliga próvroynd skulu góðkennast av Arbeiðseftirlitinum.

**§ 15.** Próvdómari skal góðkennast av Arbeiðseftirlitinum.
Stk. 2. Próvdómarin skal skrivliga vátta, at næmingurin hevur klárað ástøðiligu próvroyndina undir ásetta tali av feilum, og at næmingurin kann koyra trukkin, stápla plattar og fiskakassar, flyta góðs millum hillar og seta trukkin á rættan hátt.
Stk. 3. Próvdómari og lærari kann ikki vera sami persónur.

### *12. Loyvisbræv*

**§ 16.** Arbeiðseftirlitið umsitur loyvisbrøvini og útskrivar loyvisbrøv eftir innsendum skjølum, ið váttað eru, bæði av frálærara og próvdómara.
Stk. 2. Arbeiðseftirlitið tekur gjald, sambært kunngerð fyri umsiting og útskrift av loyvisbrævi.

### *13. Gildi fyri reglugerðina.*

**§ 17.** Hendan vegleiðing kemur í gildi 1. januar 2008.

§ 18. Samstundis fara úr gildi:

- Reglugerð nr. R-C002-4, Reglugerð um frálæru til Gaffiltrukkførarar, 19. februar 2001 og
- Umfarskriv nr. U-C002-1 um skeið fyri gaffiltrukkførarar, 16. september 2002

**Arbeiðseftirlitið**, 11. januar 2008

_________________________

Karl Joensen, stjóri (sign.)